INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

31. august 2011
Mál: 11/00543-7
Tygara skriv: Klik her for at angive tekst.
Málsviðgerð: GMN

# Uppskot

# til

# løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu

**§ 1**

Í løgtingslóg um ferðslu, sbr. løgtingslógarkunngerð nr. 14. frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 49 frá 11. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Í § 2, III, verður aftan á C sett inn nýtt D, sum verður soljóðandi:

**”D. Lendisfarandi akfar (ATV):** Motordrivið akfar á 4 hjólum ella fleiri við eini eginvekt yvir 200 kg. Motororkan skal vera størri enn 15 kW. Akfarið skal verða útgjørt við last ella viðførisberara.”

**2)** Yvirskriftin áðrenn § 11, verður brott til:
”*Skráseting av motordrivnum akførum v.m.*”

**3)** Í § 11, stk. 1, verður ”Motorakfar og dragi (traktor)” broytt til: ”Motorakfar, traktorur og lendisfarandi akfar”.

**4)** Aftaná § 11 verður sett inn:
*”Serligar reglur fyri koyring við lendisfarandi akfari.*
**§ 11a.** Lendisfarandi akfar, sum er skrásett, kann bert koyra á ella tvørtur um veg, í sambandi við yrkisligan flutning til ella frá ella millum arbeiðsøki, og skal flutningurin tá fara fram á stytst møguligum strekki.”

**5)** Yvirskriftin yvir § 18a *”Koyrikort til traktor, motoramboð og lítla motorsúkklu”*, verður broytt til: *”Koyrikort til traktor, motoramboð, lendisfarandi akfar og lítla motorsúkklu”*.

**6)** Í §18a, stk. 4, verður aftan á orðið ”45 km/t” sett: ”og lendisfarandi akfar”.

**7)** Í § 30b, verður sett sum nýtt stk. 6:

“*Stk. 6.* Fyri lendisfarandi akfar og vognarað samansett av lendisfarandi akfari og skrásetingarskyldugum viðfestum akfari, má ferðin óansæð

§ 30a ongantíð fara upp um 60 km/t”.
Stk. 6 og 7 verða hereftir stk. 7 og 8.

**8)** Í § 42, stk 1, verður ”bili ella á tríhjólaðari motorsúkklu” broytt til: ”bili, lendisfarandi akfari ella á tríhjólaðari motorsúkklu”

**9)** Í § 42c, stk. 1 verður ”tvíhjólaðari motorsúkklu, ella av motorsúkklu við síðuvogni,” broytt til: ”tvíhjólaðari motorsúkklu, motorsúkklu við síðuvogni ella lendisfarandi akfari,”

**10)** Í § 42c, verður sett sum nýtt stk. 4: “*Stk. 4.* Skyldan at nýta fallhjálm er ikki galdandi fyri lendisfarandi akfar, um tað er útgjørt við trygdarbeltum og føraravernd.”
Stk. 4 verður hereftir stk. 5.

**11)** Í § 58a, stk. l, nr. 1), verður eftir ”§ 11, stk. l” sett inn: “§ 11a”

**12)** Í § 58b, verður sett sum nýtt stk. 2: “*Stk. 2.* Ikki-skrásetingarskyldugt lendisfarandi akfar, skal dragst inn, um eigarin tvær ferðir áður innan fyri tey seinastu 3 árini, hevur gjørt seg sekan í broti á ferðslulógina, við at koyra á ferðslulógarinnar øki við ikki-skrásetingarskylduga lendisfarandi akfarinum.”
Stk. 2 verður hereftir stk. 3.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2012.

**Kap. 1. Almennar viðmerkingar**

Í sambandi við viðgerð í tinginum av broytingum í ferðslulógini á vári 2007, segði meirilutin í vinnunevndini soleiðis í Lm. nr. 102/2006:
*“Ein meiriluti (Jørgen Niclasen, Heðin Zachariasen, Johan Dahl og Gerhard Lognberg) vísir á, at nógvar ATV (bóndasúkklur) eru í Føroyum, og verða tær mest nýttar sum arbeiðstól í bø og haga. Hesar kunnu koyrast millum heim og arbeiðspláss. Fáa bóndasúkklur loyvi at koyra á vegunum, ber til at seta treytir til trygdarútgerð v.m. Í t.d. Íslandi er loyvt bóndasúkklum at koyra á almennum vegum. Meirilutin heitir á landsstýrismannin í vinnumálum um at hava bóndasúkklurnar við í lógaruppskotinum, sum væntandi kemur í heyst.”*

Fólkaflokkurin gjørdi í september 2008 eitt lógaruppskot um broytingar í ferðslulógini, sum loyvdi koyring á almennum veg við lendisfarandi akførum. Lógaruppskotið varð ongantíð lagt fram í løgtinginum.

Í samband við at ynski hevur verið um, at eitt lógaruppskot um lendisfarandi akfør verður gjørt, hevur Akstovan gjørt kanningar av reglunum um lendisfarandi akfør (ATV) í ES og grannalondunum og gjørt eitt notat um, hvat eitt lógaruppskot um lendisfarandi akfør eigur at innihalda.

**Hvat er eitt lendisfarandi akfar (ATVari)?**
Lendisfarandi akfar ella All Terrain Vehicle (ATV) er eitt akfar, ið er gjørt at koyra í lendinum á lágtrýst dekkum.

Vanliga hevur akfarið 4 hjól á tveimum akslum, men kann eisini hava 6 hjól á 3 akslum ella 8 hjól á 4 akslum. Akfarið hevur stýritól og sæti sum ein motorsúkkla. Akfarið kann vera útgjørt við last ella viðførisberara. Akfarið kann eisini vera útgjørt sum ein bilur við tveimum setrum, føraravernd og lítlari last.

Teir fyrstu ATVararnir vóru framleiddir í 1950unum. Í 1970unum gjørdust ATVarar populerir í sambandi við, at teir vóru nýttir til "stunts" í James Bond filminum "Diamonds are forever". At byrja við høvdu ATVarar ikki fjaðrar, men stór ballóndekk í staðin fyri mekaniskar fjaðrar. Hetta var broytt í byrjanini av 1980unum, tá teir fingu fjaðrar og lægri profil dekk.

Menningin av ATVarum hevur ført til, at ATVarar verða býttir sundur í:

- "utility" – nýtsluakfør, sum eru til vinnuliga nýtslu og sum heild eru størri akfør, ið trekkja við øllum 4 hjólunum og sum í mesta lagi kunnu koyra upp til umleið 100 km/t.
- "fun" – stuttleikaakfør, sum eru smáir lættvektarar, sum trekkja við tveimum hjólum og sum eru kvikir í upptrekkinum og kunnu koyra við ferð upp til 145 km/t.
- "sport" – kappingarakfør.

Ferðeginleikarnir hjá ATVarum eru sera vánaligir, serliga tá ferðin gerst høg. Í blaðnum Motor nr. 7/2006 stendur í eini grein um m.a. ferðeginleikar hjá ATVarum: *"Men hverken lande- eller motorvej kan anbefales: Kraftoverskuddet er for lille, og ligeud-stabiliteten er ringe. Den sejler ud ad vejen ved høj fart, og der skal ofte bruges to vognbaner."*

ATVarar til vinnuliga nýtslu hava møguleika at draga smærri viðfestivognar og eru útgjørdir við viðførisbera ella einari minni last.
Fyri at kunna bera eina tyngri last, kunnu ATVarar hava 6 hjól.

Sjálvt um menningin av ATVarum hevur verið til tað betra seinnu árini, koma álvarsom óhapp fyri, sum føra deyða ella álvarsligt mein við sær.
Hagtøl frá USA vísa, at í 2004 vóru 136.100 fólk viðgjørd á skaðastovu í sambandi við óhapp við ATVarum. Í 2003 doyðu 740 fólk í USA av skaðum sum tey fingu í sambandi við óhapp við ATVarum.
Í Svøríki eru 5 fólk deyð um árið seinastu trý árini av skaðum sum tey fingu í sambandi við óhapp við ATVarum og Quadrisúkklum

## Galdandi rættur

Lendisfarandi akfar (ATV) kann sambært galdandi ferðslulóg definerast sum eitt motordrivið akfar. Motordrivin akfør eru sambært ferðslulógini § 2, III, at skilja sum A. Motorakfar, B. Traktor og C. Motoramboð.

Lendisfarandi akfar kann sambært definitónini í ferðslulógini, hvørki definerast sum motorakfar, traktorur ella motoramboð og kann tessvegna ikki skrásetast til koyring á veg, har ferðslulógin er galdandi og kann tískil heldur ikki koyra á veg sum óskrásett akfar.

Í skjali 1 og 2 er nærri lýsing av ES-reglunum og lóggávuni í hinum norðanlondunum.

## Uppskot um nýggjar reglur fyri lendisfarandi akfør (ATV) í Føroyum

Politiski viljin í løgtinginum og í landsstýrinum er, at fáa skipaðar reglur fyri lendisfarandi akfør (ATVarar), sum verða nýtt í vinnuligum ella "semi" vinnuligum høpi, so sum entreprenørar, elfeløg, telefeløg, bóndur og seyðamenn, sum hava tørv á koyring í lendinum langt burtur frá alfaraveg, í sambandi við sítt virksemi. Harumframt eru tað eisini feløg, sum t.d. "ATV-Mountain" í Vestmanna, sum bjóða skipaðar útferðir við lendisfarandi akførum í fjøllunum uttan um Vestmanna bygd.

Ætlanin er ikki at loyva koyring við løttum lendisfarandi akførum (sports-ATVarum) á vegi.

| Flokking av **motordrivnum akførum** sambært uppskotinum: | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Motorakfar** | | | **Traktorur** | **Motoramboð** | **Lendisfarandi akfar** |
| **Bilur** | **Motorsúkkla** | **Prutl** | | | |

Skotið verður upp, at lendisfarandi akfør verða skrásett við nummarspjaldri og fáa loyvi at koyra á vegi eftir hesum treytum:

1. Lendisfarandi akfar verður í ferðslulógini definerað sum **motordrivið akfar** á 4 hjólum ella fleiri. Akfarið skal verða útgjørt við last ella viðførisberara.
   Motororkan skal vera størrri enn 15 kW (20,4 HK), sum ger tað at sports-ATVarar verða útilokaðir frá skráseting.
   Tað er trupult í definitiónshøpi at áseta eitt ávíst vektarmark, við tað at lendisfarandi akfar við størri motororku enn 15 kW, kunnu hava eina eginvekt frá 200 kilo og uppeftir. Sambært ferðslulógini, er markið fyri eginvekt 400 kg millum motorsúkklu og bil.
   Viðfest akfar til lendisfarandi akfar, verður definerað sum viðfestivognur, leguvognur ella viðfest amboð, sbrt. ferðslulógini § 2, stk. l, nr. IV.

2. Lendisfarandi akfar skal vera góðkent, **skrásett** og hava **nummarspjaldur** fyri at kunna koyra á vegi.
   Akfarið skal vera **góðkent** samsvarandi ES direktivi 92/61/EØF ella 2002/24/EF, antin við meginfloksgóðkenning ella góðkenningarváttan (CoC-dokument).

Akfarið skal lúka krøvini um ljósføring, róðurvæl og bremsur sambært ES direktivunum.

3. Lendisfarandi akfar kann bert verða nýtt í sambandi við arbeiði (jarðarbrúk, orkufeløg, elfeløg, skipaðar útferðir og líknandi). Fyriuttan yrkisliga koyring í bø og haga, hava lendisfarandi akfør loyvi at koyra á privatum vegi og at koyra tvørturum almennan veg. Lendisfarandi akfør hava eisini loyvi at koyra á vegi millum heim og arbeiðsøki, ella á vegi millum tvey arbeiðsøki og skal flutningurin tá fara fram á stytst møguligum strekki.

4. Mest **loyvda ferð** í fjølbygdum øki er 50 km/t og mest loyvda ferð uttan fyri fjølbygt øki er 60 km/t.
   Førari og møguligt ferðafólk á lendisfarandi akfari, skulu nýta fastspentan fallhjálm, meðan koyrt verður. Er lendisfarandi akfarið útgjørt við føraravernd (trygdarboylum) og trygdarbeltum, skulu hesi nýtast í staðin fyri fallhjálm, meðan koyrt verður.
   Vanligar ferðslureglur eru annars galdandi fyri koyring við lendisfarandi akførum og meðan koyrt verður í lendinum uttan fyri veg, hevur førarin víkiskyldu fyri ferðafólki til gongu og skal við møti halda til høgru og víkja fyri ferðslu frá høgru (høgravíkiskylda).

5. Koyring við lendisfarandi akfari kann bert fara fram við støði í einum **koyrikorti** til bólk A (motorsúkklu) ella bólk B (vanligur bilur). Aldursmarkið fyri koyring við lendisfarandi akfari er sostatt **18 ár**.
   Brot á ferðslureglurnar undir koyring við lendisfarandi akfari, hevur somu rættarligu fylgjur, sum koyring við motorsúkklu ella bili.

6. Lendisfarandi akfar, kann eisini verða góðkent sum traktorur, samsvarandi ES direktivi 92/61/EØF ella 2002/24/EF, antin við meginfloksgóðkenning ella góðkenningarváttan (CoC-dokument) og skal tá sambært ferðslulógini § 2, stk. 1, nr. III, litra B, í mesta lagi kunna koyra 40 km/t. Mest loyvda ferð fyri traktorar er annars 30 km/t, sambært ferðslulógini § 30b, stk. 4.

7. Skotið verður upp, at ikki-skrásetingarskyldugt lendisfarandi akfar kann verða inndrigið (konfiskera), um eigarin tvær ferðir áður innan fyri tey seinastu 3 árini, hevur koyrt á ferðslulógarinnar øki við ikki-skrásetingarskylduga lendisfarandi akfarinum og av nýggjum fremur brot á ferðslulógina, við at koyra triðju ferð innan fyri tey seinastu 3 árini.

8. Krav verður um nýtslu av fallhjálmi og trygdarútgerð

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

### Møgulig friðing fyri koyring í lendinum?

Í samband við at nýtslu av ATVarum verður loyvd á almennum vegi eigur eisini at vera umhugsa, hvussu tað ber til at verja umhvørvið móti tí skaðiligu ávirkan á vøkstur í bø og haga, sum dekkini á lendisfarandi akførunum fara at føra við sær. Møguliga kann hett gerast við støði

í galdandi løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing ella við eini serlóg um koyring í lendinum á sama hátt, sum sviar hava gjørt.

Tað verður eisini neyðugt, at áseta ferðslureglur fyri koyring í lendinum uttan fyri øki ferðslulógarinnar, herundir reglur um koyrikort og um forboð fyri rúsdrekkakoyring, reglur um ferð, víkiskyldu og trygdarútgerð v.m.

**Avgjaldsspurningar**
Lendisfarandi akfar, er sambært uppskotinum definerað sum motordrivið akfar, og kemur tí ikki undir skyldu av rinda skrásetingargjald ella $CO_2$ avgjald, við tað løgtingslóg nr. 33 frá 19-05-2008 um avgjøld við skráseting, bert fevnir um motorakfør.

Sama ger seg galdandi fyri vektgjald sambært løgtingslóg nr. 38 frá 31. mars 1982, sum eisini bert fevnir um motorakfør. Tó skulu skrásetingarskyldugir traktorar rinda vektgjald sambært § 3, stk. 1, litra E.

Við innflutning rindað øll lendisfarandi akfør inngangandi MVG, sum er 25% av fakturavirðinum.

Tað eigur at vera umhugsa, hvørt lendisfarandi akfør í sambandi við skráseting skulu rinda skrásetingargjald og $CO_2$ avgjald, eins og vektgjald.

## Kap. 3. Serligar viðmerkingar

John Johannessen,
Landsstýrismaður

/ Rúni Joensen